# Ísfjall á óvanligum leiðum

Eitt ísfjall er komið norður ímóti suðurafrikonsku strondini, og tað er óvanligt. Suðurafrikanska sjóverjan fekk fyri nøkrum døgum síðani boð um, at skip høvdu sæð eitt ísfjall óvanliga langt norðuri. Tann seinasta fráboðanin kom í gjárkvøldið frá einum fiskiskipi, sum hevði siglt fram við ísfjallinum 35 fjórðingar úr suðurafrikonsku strondini. Sjóverjan sigur, at ísfjallið er um 20 metrar breitt og einar 25 metrar høgt. - Hetta er sera óvanligt, og tað er fyrstu ferð í nýggjari tíð, at vit hava sæð eitt ísfjall so langt norðuri, sigur talsmaðurin hjá suðurafrikonsku sjóverjuni. Skip, sum eru í økinum, eru varskógvað um ísfjallið.



# Fer at leggja stórt trýst á føroyingar

**At fáa útlendingar til Føroyar at arbeiða, kann føra bæði til happing og til ófrið og tí mugu vit hugsa okkum serstakliga væl um, heldur Javnaðarflokkurin**

ÚTLENDSK ARBEIÐSMEGI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- At fáa útlendingar til Føroyar at arbeiða, fer at leggja føroyingar undir stórt trýst og tað kann føra bæði til happing og til ófrið í Føroyum.

Tað sigur Kristian Magnussen, sum er formaður fyri Javnaðarflokkin á tingi.

Føroyskir arbeiðsgevarar hava leingið skríggjað eftir arbeiðskraft á nógvum økjum, tí teir siga, at tað er stórt trot á arbeiðsmegi, bæði í fiskivinnuni, í byggivinnuni og aðrastaðni.

Í hesum sambandi hava teir gjørt sítt besta fyri at sannføra landsstýrið um, at tað einasta rætta er at gera tað lættari hjá útlendingum at sleppa til Føroyar at arbeiða.

Í hesum sambandi hevur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum, gjørt eitt uppskot, sum fer at gera tað lættari hjá ES-borgarum at sleppa til Føroyar at arbeiða.



*Í samgonguni er tað serliga javnaðarflokkurin, sum ikki enn er til reiðar at góðtaka, at tað skal vera lættari at fáa útlendska arbeiðsmegi til Føroyar. Sosatt er enn púra óvist, nær málið verður avgreitt*

### Í leysari luft

Uppskotið hevur verið liðugt í minst ein mánað og síðani hevur tað verið til viðgerðar í politisku skipanini.

Men enn er púra óvist, nær tað verður búgvið at leggja fyri Løgtingið og fyri fólkatingið.

Og tað skilst á øllum brøgdum, at tað er serliga javnaðarflokkurin í samgonguni, sum er ivingarsamur.

- Tað er rætt, at vit vilja ikki lata slúsurnar upp uttan víðari, sigur formaðurin fyri Javnaðarflokkinum á tingi.

Annars dugir Kristian Magnussen als ikki at skilja, hví tað er blivið so torført at fáa útlendingar til Føroyar.

- Danskir myndugleikar hava altíð gjørt okkum greitt, at í Føroyum fáa vit tann útlendingapolitikk, vit vilja hava. Tað, vit kenna til, hevur tað heldur aldrin verið nakar trupulleiki at fáa útlendingar higar. Tað einasta, føroyskir myndugleikar skuldu gera, var at viðmæla ella frámæla eini umsókn.

- Men hesi seinastu árini er fullkomiliga stígur komin í og tað skilji eg ikki.

Sjálvur metir hann, at ein orsøk kann vera, at føroyingar tað einu tíðina fóru at viðgera umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi, hóast tað var eitt málsøki, vit onki høvdu við at gera og so varð alt málið fløkt í ein ellubita og at tað er hetta, vit ikki komu burturúr aftur.

### Føroyingar sutta labbarnar

Formaðurin fyri tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum sigur, at tað er ein rættiliga grundleggjandi avgerð at lata upp fyri ES-borgarum.

- Eftir ætlan skulu teir tryggjast 30 tíma arbeiðsviku og tað kann leggja okkum undir stórt trýst og føra til happing og ófrið.

Hann sipar til, at seinastu mánaðirnar hevur lítið og onki fiskaarbeiði verið.

- Skuldu vit nú havt nógvar ES borgarar her, sum skuldu tryggjast 30 tíma arbeiðsviku, høvdu arbeiðsgevarar verðið noyddir at tikið teir framum og latið føroyingar sitið heima og sutta labbarnar. Tað sigur seg sjálvt, at tað kundi ført til ófrið og frustratiónir. Men frustratiónin og ágangurin høvdu uttan iva verið vend ímóti útlendingunum, sum í veruleikanum eru ósekir, tí tað er ikki altíð, at kanónirnar venda rættan veg.

Hann sigur, at serliga tí at vit eru eitt lítið samfelag, eiga vit at hugsa okkum serstakliga væl um.

Hann leggur afturat, at seinasta tíðin er bara eitt dømi um, hvussu knappliga tað gongur hvønn veg í fiskivinnuni, tí broytingarnar henda frá viku til viku.

- Hettta er eitt mál, sum vit rætt og slætt noyðast at hugsa serstakliga væl um, leggur hann afturat.

Hann sigur, at er tað byggivinnan, sum er í trupulleikum, skilir hann ikki, hví tað ikki ber til at útvega arbeiðsmegi við lógini, sum er, tí tað bar var til fyrr.

## Kvinnulistar krevja lógarbroyting

VALLÓG

*Áki Bertholdsen*

- Tað er púra greitt, hvussu lógin skal tulkast. Og skal tað broytast, má lógin broytast.

Tað sigur Hilmar Høgenni deildarstjóri í innlendismálaráðnum.

Seinastu tíðina hevur ein kvinnubólkur roynt at ávirka politikarar til at taka stig til at gera tað lættari at gera kvinnulistar.

Í hesum sambandi vilja tær í bólkinum hava, at tað skal gerast púra greitt, at grein 18 í vallógini skal tulkast so, at stillar ein flokkur fleiri listar upp í sama valdømi, skulu atkvøðurnar hjá øllum listunum telja saman.

Men Hilmar Høgenni ger vart við, at á hesum øki er lógin púra greið og kann bara tulkast upp á ein máta og tað er, at atkvøðurnar hjá hvørjum lista vera taldar hvør sær og at listarnir fáa umboð á ting eftir tí.

- Tað ið valdømisvaldir tinglimir skulu býtast, verður bara hugt eftir sjálvum valevnislistunum.

Skal talan vera um at leggja atkvøðurnar hjá fleiri listum saman, tá ið valdømisvaldir tinglimir skulu býtast, er neyðugt við beinleiðis lógarbroyting, sigur hann.

### Ikki Kristian, men John

Í Sosialinum í gjár umrøddu vit møguleikarnar fyri at gera kvinnulistar. Tá nevndu vit sum dømi, at hevði Javnaðarflokkurin í Suðurstreymoyhavtkvinnulista, hevði Helena Dam á Neystabø verðið vald ístaðin fyri Kristian Magnussen.

Her vóru vit nakað skjót at avhøvda Kristian, tí tað hevði ikki verið hann, sum fall. Kristian Magnussen var nevniliga fyrst valdur á javnaðarlistanum í Suðurstreymoy við 412 atkvøðum. Tann, sum hevði fallið, hevði verið John Johannessen, sum fekk 380 atkvøður. Annars fekk Helena Dam á Neystabø 341 atkvøður

# Smyril kemur aftur til tíðina

**Landsstýrismaðurin vil hava fíggjarnevndina at játta tvær milliónir afturat til ábøtur á Smyrli**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er alt, sum bendir á, at Smyril verður ikki vekk úr suðuroyarsiglingini longri enn upprunaliga mett.

Tað sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum.

Smyril er farin til Landskrona í Svøríki til eftirlit, samstundis sum at ymsar ábøtur skulu gerast.

Talan er í mesta mun um ábøtur, sum eru umfataðar av trygdini hjá Skipasmiðjuni.

Upprunaliga varð mett, at tað fer at taka Skipasmiðjuni tríggjar vikur at gera eftirlitið og neyðugu ábøturnar.

Eitt, sum arbeiðið umfatar, er at gera stabilisatorararnar endaliga, eftir at teir vórðu fyribils umvældir fyrr í ár.

Og nú Smyril varð tikin upp í dokkina um vikuskiftið og alt er gjøgnumgingið, hevur skipasmiðjan boðað frá, at alt bendir á, at hon fer at megna at halda tíðina.

Men kortini varð mett, at nú Smyril er í dokk, er tað rætt eisini at gera ábøtur fendararnar framvið síðuni, sum hava fingið buglur ymsastaðni.

Jacob Vestergaard sigur, at hetta er eitt arbeiðið, sum er mett at kosta tvær milliónir og nú hevur hann biðið fíggjarnevndina játta peningin, so at arbeiðið kann gerast.



*Smyril verður ikki longur burtur úr sigling enn upprunaliga ætlað*

Men sum fráboðanin frá Skipasmiðjuni er nú, bendir alt á, at Smyril verður aftur í sigling fyrst í novembur, sum ætlað.